# Sethúsasølan flutt yvir um vegin







*Hannelena Jacobsen, stjóri*

**Nýggjársdag flutti Sethúsasølan yvir um Tórsgøtu**

HÚSASØLA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Sethúsasølan er flutt, men bara nakrar fáar metrar. Í fleiri ár hevur fyritøkan húsast í Tórsgøtu, og tað ger hon framvegis, men nú hinumegin gøtuna í niðastu hædd hølunum hjá Frants Restorff.

Hannelena Jacobsen, stjóri, sigur, at nýggju hølini eru væl egnað til teirra virksemi. Har eru stór framsýningarvindeygu, og har kunnu fólk nú síggja myndir av teimum húsunum, sum eru til sølu.

Hannelena Jacobsen keypti Sethúsasøluna fyri trimum árum síðani, og tað hevur gingið væl. Nógv hús eru til sølu, og tað stendur heldur ikki á at selja. Í meðal tekur tað Sethúsasøluni ein góðan mánað at selja eini hús í Havn, og eru húsini nærhendis Havnini, tekur tað heldur ikki langa tíð at selja tey. Áhugin fyri húsum í Kollafirði, Hósvík og í Vágum hevur eisini víst seg at vera stórur.

Trý fólk arbeiða hjá Sethúsasøluni. Umframt stjóran, sum tekur sær av sjálvari søluni, er ein byggifrøðingur, sum metir húsini og ger lýsingar av teimum, og ein skrivstovukvinna tekur sær av pappírsarbeiðinum so sum at skriva skeyti.

Júst nú hava tey fitt av arbeiði í sambandi við nýggju lógina, sum ásetir, at allir vinnubygningar skulu virðismetast.

Innlendismálaráðið

## Stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum

- sum menna vitanina um umhvørvið og/ella náttúruna
- sum virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella -avmarkandi
- sum verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg
- sum kunna almenningin um umhvørvis- og/ella náttúruviðurskifti

Umsóknarblað, kunning og reglugerð fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2007

Innlendismálaráðið varð stovnað eftir løgtingsvalið 2004. Í Innlendismálaráðnum starvast 16 starvsfólk. Innlendismálaráið situr m.a. fyri kommunumálum, byggimálum, kærumálum, lógarmálum, navnamálum, útlendingamálum, lendisskipan, náttútumálum, skógarmálum, umhvørvismálum, útjaðaramálum og Strandfaraskipum Landsins.

Innlendismálaráðið

## Stuðul av játtanini til frama fyri viðarvøkstur

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál m.a. er at stuðla viðarvøkstri til tess at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir, umframt at verja ímóti jarðarmáan.

Umsóknarblað, kunning og reglugerð fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2007

Innlendismálaráðið varð stovnað eftir løgtingsvalið 2004. Í Innlendismálaráðnum starvast 16 starvsfólk. Innlendismálaráið situr m.a. fyri kommunumálum, byggimálum, kærumálum, lógarmálum, navnamálum, útlendingamálum, lendisskipan, náttútumálum, skógarmálum, umhvørvismálum, útjaðaramálum og Strandfaraskipum Landsins.

## Reingerðarfólk
til posthúsið í Saltangará

**Søkt verður eftir einum reingerðarfólki til posthúsið í Saltangará at byrja skjótast gjørligt.**

**Arbeiðstíðin er 4 tímar um dagin ella 20 tímar um vikuna.**

**Løn smb. sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Postfelag.**

**Nærri upplýsingar fáast frá posthúsleiðaranum í Saltangará, tlf. 212149**

**Skrivlig umsókn verður í seinasta lagi 11. jan. 2007 send til:**

**Posthúsleiðaran**
**Posthúsið**
**600 Saltangará**

Pf. Postverk Føroya



Postverk Føroya

P/F Postverk Føroya · Heiðavegur 57 · 600 Saltangará · Tlf. 447557

## AQUA-VATN-AEROBIC

VEKTKONTROL Í GØTU SKÚLA

Venjingar í vatn-aerobic, rørslum í vatni og vektkontrol byrja í:
Gøtu-skúla 10. januar frá kl. 21.00-22.00 og 10 vikur fram (10 vikur skeið).

Aerobic-instruktør: Guðrun Malena Hansen er útbúgvin Aerobic-instruktørur og hevur undirvíst í Føroyum og Danmark.

Vatn-aerobic, rørslur í vatni til tónleik við Aerobic-instruktøri, við kombinatión av øvilsum, sum styrkja BÚK - RYGG -ARMAR -RUMPU LØR (allan kroppin).

Øll eru vælkomin. Kostnaður 800 kr.
Hetta er fyri allar aldursbólkar - ung sum eldri - og tað er ikki ein fyritreyt at tú mást duga at svimja.

Kom og ver við til aqua vatn-aerobic og fá eitt lættari & sunnari lív.

Seinasta freist at gjalda er 8. januar.

Tekning á tel. 273164 / 442166
Ella á telduposti: pilates@kallnet.fo